Boring í 2006 uppá pláss í november:

# Brugdan vegamót í føroyskari oljuleiting

**Brugdan kann gerast eitt vegamót í oljuleiting við Føroyar. Átta oljufeløg eru komin ásamt um at leggja tveir brunnar saman og bora ein kostnaðarmiklan brunn inni á basaltinum á landgrunninum um gott og væl eitt hálvt ár. Endaliga avtalan kemur uppá pláss um eina viku ella so**

**OLJULEITING**
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Herfyri skrivaðu oljufeløgini BP, Shell og Anadarko undir eina avtalu at bora ein brunn inni á landgrunninum á 9 ára loyvinum hjá Anadarko í 2007. Hetta hendi í Ojufyrisitingini eftir drúgvar samráðingar. Avgerðin hevur við sær, at tveir brunnar, sum BP og Shell hava bundið seg at bora í tí sonevnda "Gullhorninum" 1. útbjóðing, verða lagdir saman til ein brunn, sum so verður boraður á basaltinumlongur inni á landgrunninum.

Eisini tvey onnur oljusamtøk við Statoil og Amerada Hess sum fyristøðufeløg hava tveir brunnar eftir at bora frá 1. útbjóðing. Samráðst hevur verið um at leggja hesar báðar brunnarnar saman og bora ein brunn somuleiðis á basaltinum longur inni á landgrunninuminni á 9 ára loyvinum hjá Statoil í næsta ár.

Eftir tí sum Sosialurin skilur, so eru samráðingarnar við at koma uppá pláss. Her er talan um at samansjóva ynskini hjá ikki færri enn 8 oljufeløgum, og tí hevur drigið út við at fáa allar lutir uppá pláss. Sum skilst hava feløgini loksins loyst øll ivamálini og kemur henda avtalan helst endaliga uppá pláss fyrst í november.

Oljufeløgini, sum verða við í hesi eini tí kanska mest spennandi og kostnaðarmiklu og harvið eisini mest váðiligu oljuboringini á føroyska landgrunninum nakrantíð, eru Statoil, Dong, Shell, Petro Canada, Amerada Hess, BG, Atlants Kolvetni og Anadarko. Feløgini hava gjørt seismiskar og aðrar kanningar á landgrunninum í summar og er ætlanin at seta borin í sokallaða Brugduprospektið einaferð næsta summar.

Sum skilst eru rættiliga stórar vónir til hesa boringina. Úrslitið av henni kann fáa veruliga gongd á oljuleiting við Føroyar. Tað nýggja og áhugaverda við hesi boringini er, at hetta verður fyrsti brunnur um okkara leiðir, har borað verður gjøgnum tjúkkar basaltfláir. Enn vita feløgini ikki fyri vist, hvussu tjúkkar tær eru men talan kann vera upp í ein kilometur.

Sera torført er í løtuni at fáa boripallar til slíka boring, men Sosialurin skilur, at fyristøðufelagið Statoil hevur fingið fatur á einum boripalli.




*Her í 9 ára loyvinum hjá Statoil er ætlanin at seta borin í um gott og væl eitt hálvt ár. Økið, sum borað verður í, hevur fingið heitið Brugdan.*

# Bora 5 brunnar hinumegin markið komandi árini

**OLJULEITING**
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Atlantsmótið er av álvara við at koma aftur á oljukortið. Fleiri stór altjóða oljufeløg fara komandi tvey árini at seta borin í undirgrundina á fimm ella kanska uppaftur fleiri støðum á bretska landgrunninum. Fyri Føroyar hava hesar boringar stóran týdning, tí tær verða allar framvið markinum skamt frá føroyska landgrunninum, har fleiri leitiloyvi vórðu latin fyrr í ár.

Herfyri upplýsti oljufelagið Chevron, at tað fer at bora ikki færri enn tríggjar avmarkingarbrunnar á Rosebankøkinum, har ein risastór oljakelda varð funnin fyri góðum ári síðani.

Nú skilst, at lív fer eisini at koma í enn eitt oljufund, sum varð gjørt fyri nøkrum árum síðani beint sunnan fyri Rosebank. Talan er um oljufundið Cambo, sum higartil hevur verið eitt sokallað tighthole tvs. at einki er komið út alment um fundið. Keldur í oljuverðini vilja tó vera við, at her er talan um eitt veruligt oljufund. Higartil er boraður ein avmarkingarbrunnur har, og nú skilst, at oljusamtakið við Amerada Hess sum fyristøðufelag fer at bora enn ein avmarkingarbrunn í næsta ár. Nú verður so leitað eftir boripalli.

Fara vit longur norður eftir framvið markinum, so hava Chevron og Mærsk í kvittanum at bora ein brunn í 2007 í einum loyvi, sum somuleiðis liggur uppat føroyskum øki.

Okkurt bendir á, at eisini annað borivirksemi verður á bretskum øki vestan fyri Hetland komandi árini.




*Pílarnir vísa áleið økini, har 5 brunnar verða boraðir næstu tvey árini*

# FOÍB vil gera landgrunnin meira kappingarføran



*Ben Arabo, formaður í FOÍB*

**Áhugafelagið hjá teimum 14 oljufeløgunum, sum eru virkin í Føroyum, hevði fund í Havn nú um dagarnar. - Vit royna at savna kreftirnar og brúka orku uppá at gera landgrunnin meira kappingarføran. Hetta verður gjørt við m.a. góðum dialogi millum allar partar sigur formaðurin Ben Arabo**

OLJUFUNDUR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Áhugafelagsskapurin hjá oljufeløgunum, sum leita eftir olju við Føroyar, FOÍB, hevði fund í farnu viku. Tá møttu fyri fyrstu ferð eisini umboð fyri nýggju oljufeløgini, Chevron, OMV og Geysir, ið fingu leitiloyvi í 2. útbjóðing fyrr í ár. Tilsamans 14 oljufeløg eru nú limir í FOÍB. Ben Arabo, stjóri í oljufelagnum Amerada Hess er formaður í felagsskapinum. Hann fegnast um, at tað nú eru 14 oljufeløg, sum sita við borðið. Undan fundinum í farnu viku var limatalið 11. So henda sannroynd peikar tann rætta vegin.

Sjálvur heldur formaðurin, at tað er týdningarmikið at hava eitt slíkt felag, tí tað er við at fasthalda áhugan fyri Føroyaøkinum umframt at varðveita og menna dialogin millum feløgini sínamíllum og við landsins myndugleikar.

Eitt av endamálunum við FOÌB er at gera føroyska økið so kappingarført sum gjørligt. Og tað verður gjørt við einum mennandi dialogi, við at vera til til at stuðla skilagóðar verkætlanir ikki minst á umhvørvisøkinum o.a.

- Vit lærdu nógv av teimum fyrstu brunnunum, ið vórðu boraðir við Føroyar. Tað hevur týdning, nú feløg og persónar eisini koma og fara, at vit varðveita og goyma hesa vitan. Endamálið er so eisini at tosa við einari rødd, soleiðis at alt arbeiðið hjá bæði feløgum og myndugleikum verður so nógv lættari sigur Ben Arabo við Sosialin.

Virksemið hjá FOÍB fevnir víða. Arbeitt verður við málum av felags áhuga fyri oljufeløgini. Tey hava eitt nú arbeitt við umhvørvismálum. Har hava tey keypt datatilfar frá fyritøkum og annars verið við til at fíggja útsetan av veðurboyum umframt at stuðla dygdargóðum umhvørviskanningum, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan og aðrir stovnar hava gjørt.

Tað eru sjálvandi fyrst og fremst feløgini sjálvi, sum standa fyri ymsu kanningunum, men her roynir FOÍB so at byggja brýr millum øll feløgini og fáa eitt samstarv í lag, sum so aftur kann vera hvørjum felag til stórt gagn og so eisini føroyskum myndugleikum. Eisini er felagið hoyringspartur í sambandi við at nýggjar lóggávur verða smíðaðar. Eitt mál, sum FOÍB hevur brúkt nakað av orku til er at skunda undir royndirnar at fáa eina dupultskattaavtalu við Bretland. Ben Arabo sigur seg skilja, at gongd er í málinum.

Tað er Atlanticon, sum er sekretariat tvs. tekur sær av rakstrinum og fyrisitingini hjá FOÍB. Regin Hammer er projektsamskipari. Sum skilst á oljufeløgunum, so eru tey sera væl nøgd við arbeiðið, sum Atlanticon-fólkini gera.

Skulu vit samanbera okkara FOÌB við líknandi felagsskapir í útlandinum, so verður tað við bretska UKOOA og tað norska OLF.

# Allir íbúgvar í Alberta í Kanada fáa oljukekk

**Við jøvnum millumbili verður fantaserað um oljukekkin, sum føroyingar (møguliga) fara at fáa tá og um oljupengarnir byrja at fossa inn í landskassan. Í Alberta, Kanada, gerst hesin dreymur veruleiki í jannuar 2006 skrivar føroyingurin Jens Christian Justinussen úr Kanada. Tað er tann høgi oljuprísurin, sum hevur gjørt, at Alberta hevur fingið eitt óvæntað yvirskot uppá 6.8 mia. dollars. Ein part av hesum peningi hava tey valt at givið út til allar íbúgvarnar í Alberta**

*Jens Christian Justinussen*
*Jc@megaviking.com*



*Oljuframleiðsla í Alberta*

Í januar 2006, fáa allir íbúgvar í Alberta, Kanada, ein oljukekk uppá 400 dollars per. person. Ein familja við tveimum børnum, fær sostatt 1600 dollars - skattafrítt.

Í alt fer stjórnin í Alberta at geva 1.4 mia dollars beinleiðis til fólkið. Oljukekkurin kemur ikki at ávirka aðrar inntøkur fólk hava frammanundan, sum t.d. pensión.

Øll, sum hava búðstað í Alberta, hava rætt til oljukekkin, undantikið tey, sum sita í fongsli og tey sum ikki hava goldið barnapenging.

Alberta er oljuríkasta øki í Kanada og ovurhonds høgu oljuprísurnir seinastu tíðina hava givið tí almenna eitt óvæntað yvirskot. Serliga aftaná at orkanin Katrina herjaði í Mexikanska golfinum og smildraði 109 oljupallar.

Mett verður, at Alberta við sínari sandolju (t.e. olja, sum er í sandi, eitt slag av tjøru) hevur ikki minni enn 175 mia. tunnur av olju. Hetta er næststørsta oljukeldan í heiminum! Næst eftir Saudi Arabia, sum mett verður at hava 250 mia. tunnur av olju.

Trupulleikin við oljusandinum hevur verið, at tað krevur nógva orku at skilja oljuna frá sandinum. Prosessin krevur nógv gas og vatn og við lágum oljuprísum hevur tað ikki lønt seg at útvunnið oljuna. Men nú oljuprísurin er farin upp, er tað vorðið profitabult, og oljuvinnan í Alberta hevur tikið dik á seg. Seinastu fimm árini hevur tað verið investerað fyri 24.7 mia. dollars í hesa vinnu.

Flestu íbúgvar hava ikki beklagað seg yvir at fáa nøkur oyru eyka. Men røddir hava verið frammi um, at tað er sera óheppið at geva pengar út uppá hendan mátan, tí tað kann lætt føra til øvundsjúku í restini av Kanada, sum annars bert merkja høga oljuprísin við einari øktari olju- og hitarokning.

Ein maður helt, at 400 dollars hvørki gjørdi til ella frá og helt, at tað hevði verið nógv betur, um tað almenna brúkti pengarnar til at investera í sjúkrahús ella okkurt sovorðið.

Ein sølukvinna helt hinvegin: "Hetta er nokk til at gjalda fyri granitvaskið, sum eg leingi havi ætlað mær at keypt".

Frank, sum er professari í búskaparfrøði segði: "Forsetin Ralph Klein, 62 sum fer frá í pensión næsta ár, vil hava, at fólk skulu minnast hann við einum smíli"

"Óheldigvís er tað eitt smíl sum ikki kemur at vara leingi, tí skúlar, vegir og sjúkrahús eru so illa fyri av øllum niðurskerjingunum seinastu fimtan árini, at tað koma vit at blíva við at merkja."

Fíggjarmálaráharrin, Sherly McClellan, segði, at albertar hava uppiborið eitt sindur av viðvindi og hava onga grund til at hava ringa samvitsku av oljukekkinum.

"Albertar hava arbeitt hart og givið nógv til provinsin."

"Alberta hevur goldið alla skuld aftur, og vit eru lægsta fíggjarliga byrðan í Kanada. Hetta eru pengar albertar sjávir kunnu brúka sum teimum listir - ella spara upp um tey vilja tað."

Báðir andstøðuflokkarnir, teir liberalu og demokratarnir, hava verið kritiskir yvirfyri oljukekkinum, men ikki nokk til at steðga honum. Tað er ringt at siga nei til pengar. Eisini um tú ert ein vinstrahallur demokratur:

Brian Mason: "Eg eri ikki glaður fyri hetta tiltakið, tí hetta vísir, at stjórnin ongar langtíðarætlanir hevur. Men hinvegin, so eru nógv fólk hart fyri fíggjarliga. Tað eru fólk, sum hava brúk fyri einum lætta. Eg fari ikki at standa millum tey og ein kekk uppá 400 dollars".

Tann liberali Rick Miller segði: "Fólk fara at brúka pengarnar uppá I-pods!"

Tilsamans er yvirskotið í Alberta umleið 6.8 mia. kanadiskar dollars og kann áðrenn árið er úti koma upp á 8.8 mia dollars, tí oljuprísirnir eru enn óstabilir, segði figgjarmálaráharrin Shirley McClellan.

Ralph Klein, sum er forseti í Alberta, vísir aftur øllum kritikki um manglandi planlegging og sigur, at ætlanin er stutt sagt: at geva aftur, at investera og at spara upp.

"Tað vit geva út við oljukekkinum er bert ein partur av samlaða yvirskotinum".

"Restin av pengunum, sum er millum 70-75% av samlaða yvirskotinum, fara vit at investera í infrastruktur, skúlar, hospital og leggja til síðis til framtíðar nýtslu , segði Ralph Klein.